LØGBITI NR. 12

# FYRISITINGARLIG SEKTARUPPSKOT

LÓGARTÆNASTAN

2. útgáva - oktober 2025

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 12**

# Fyrisitingarlig sektaruppskot

Í hesum løgbita verða mørkini millum útinnandi valdið og dømandi valdið viðgjørd í sambandi við møguleikan hjá fyrisitingarligum myndugleikum at nýta fyrisitingarlig sektaruppskot, tá ið mál skulu avgerast.

## 1. Valdsbýtið

§ 1 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya er soljóðandi:

> Í yvirtiknum málum er lóggávuvaldið hjá løgtinginum og løgmanni í felag. Útinnandi valdið er hjá landsstýrinum. Dómsvaldið er hjá dómsstólunum.

§ 3 í Danmarks Riges Grundlov er soljóðandi:

> Den lovgivende magt er hos kongen og folketinget i forening. Den udøvende magt er hos kongen. Den dømmende magt er hos domstolene.

Hesar reglur um valdsbýtið áseta, hvørjar uppgávur ávikavist løgting og løgmaður (kongur og fólkating), landsstýri (kongur) og dómstólar hava, og seta samstundis mørk fyri, hvussu langt hvør av teimum trimum leikarunum í valdsbýtinum kunnu fara.

Tað er sostatt uttan víðari greitt út frá lógarásetingunum, at landsstýrið ikki kann lóggeva, og at løgtingið ikki kann døma. Tó at hetta kann sýnast týðiligt, kunnu tað í lóggávuarbeiðnum stinga seg upp spurningar um, hvar markið er, og hvussu langt lóggávuvaldið og útinnandi valdið kunnu fara tá tað kemur til at døma, undir hesum serliga at revsa.

## 2. Fyrisitingarlig avgerð ella revsing

Sambært valdsbýtinum, sum greitt frá omanfyri, er tað avgerandi fyri, hvussu eitt ítøkiligt mál skal viðgerast, og hvør skal viðgera tað, um talan er um eina fyrisitingarliga avgerð ella um eina revsing.

Valdsbýtið í stýrisskipanini og í grundlógini hava við sær, at tað einans eru dómstólar, sum kunnu døma, og harvið áleggja revsing. Revsing kann einans verða áløgd undir einum revsimáli, har rættartrygdin hjá tí einstaka verður tryggjað. Hetta hevur við sær, at reglurnar í rættargangslógini um revsimál altíð eiga at verða fylgdar, um revsing skal áleggjast. Rættargangslógin hevur ásetingar um, hvussu myndugleikar, undir hesum dómstólar, politi og ákæruvald, skulu handfara revsimál. Hesar ásetingar skulu tryggja borgaranum í Føroyum eina virkna verju av teirra rættindum.

Av tí, at serligu reglurnar í rættargangslógini skulu nýtast í revsimálum fyri at geva borgarum ta verjuna borgarin skal hava, er avgerandi, at tað er greitt, nær talan er um eitt revsimál.

Sambært artikkul 6 í Evropeiska Mannarættindasáttmálanum, sum er settur í gildi fyri Føroyar sum lóg 1. mai 2000, hevur ein og hvør rætt til eina rættvísa og almenna rættargongd m.a. tá viðkomandi er ákærdur fyri eitt lógarbrot, t.e. í revsimálum.

Henda áseting hevur við sær, at tað í Evropeiska Mannarættindasáttmálanum verður veitt persóni, sum er ákærdur fyri eitt lógarbrot, ein serlig trygd við tað, at revsing einans kann verða áløgd í sambandi við eina rættvísa og almenna rættargongd.

Hvørt talan er um eina ákæru um lógarbrot og harvið eitt revsimál, sum gevur borgaranum rætt til serliga verju, hevur Evropeiski Mannarættindadómstólurin í siðvenju lagt fast, at tað í hesi avgerð m.a. skal metast um, hvussu málið er bólkað nationalt, slagi av lógarbroti, og slag og styrki (intensitet) av sanktiónini.

Henda meting hevur m.a. við sær, at um eitt lógarbrot í nationalari lóggávu er regulerað í revsirættinum, kann hetta geva eina ábending um, at tað er at rokna sum eitt revsimál. Er talan um reglur, sum eru eins ella samanberiligar við revsiásetingar í revsirættinum kann hetta tala fyri, at talan er um eitt revsimál. Hetta er eisini galdandi, um ein áseting vendir sær ímóti øllum, sum bróta reglurnar. Um ásetingin hevur eitt ræðandi ella revsandi endamál, tá talar hetta eisini fyri, at talan er um eitt revsimál, sum skal avgerast innanfyri revsirættargangin. Er talan um eina frælsisrevsing, talar hetta fyri, at talan er um eitt revsimál. Tá sektir verða álagdar verður m.a. hugt at møguligu støddini umframt avleiðingunum av, at sektin ikki verður goldin. Eisini verður hugt at, um sektin verður ásett eftir somu meginreglum, sum revsing verður ásett.

Ein slík heildarmeting kann hava við sær, at sjálvt um eitt mál ikki er bólkað, sum eitt revsimál, er tað kortini at meta sum eitt slíkt mál, tí virknaðurin av avgerðini er tann sami, sum av eini revsing. Er niðurstøðan henda, eigur tí einstaka at verða givin tann rættartrygd, sum verður givin í revsirættarganginum.

## 3. Fyrisitingarligar sektir

Ein fyrisitingarlig sekt (da. administrativ bøde, en. administrative fine) er ein sekt, sum ein fyrisitingarligur myndugleiki tekur avgerð um í einum fyrisitingarligum máli og við at fylgja teimum reglum, sum vanliga eru galdandi fyri ein fyrisitingarligan myndugleika.

Tað er ivingarsamt um fyrisitingarligar sektir eru í samsvari við § 1 í stýrisskipanini og § 3 í grundlógini, sum ásetur valdsbýti millum lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið.

Tað er ein grundleggandi meginregla í føroyskum og donskum rætti, at sektir, sum eru at meta sum eitt revsirættarligt tiltak, einans kunnu verða álagdar av einum dómstóli og við teimum trygdum fyri ákærda, sum revsirættargangurin gevur. Hetta er eisini í samsvari við siðvenju hjá Evropeiska Mannarættindadómstólinum, sum greitt frá omanfyri.

Hóast ein sekt verður kallað fyrisitingarlig, kemst sostatt ikki uttanum, at virknaðurin er at meta sum ein revsing, og at tað óivað eisini í flestu førum er endamálið at revsa fyri eitt lógarbrot.

At tað umframt eina fyrisitingarliga sekt er møguligt at revsa, t.d. við eini revsirættarligari sekt, hevur eisini við sær møguleika fyri dupultari revsing, sum tað vanliga er forboð fyri, sbrt. meginregluni *ne bis in idem*.

Av hesum orsøkum er ikki møguligt í lóg at áseta reglur um, at myndugleikar kunnu geva fyrisitingarligar sektir fyri lógarbrot.

## 4. Fyrisitingarlig sektaruppskot

Eitt fyrisitingarligt sektaruppskot er ein revsirættarlig avgerð, sum ein fyrisitingarmyndugleiki kann gera uppskot til, og sum bert kann nýtast í heilt serligum førum. Fyrisitingarlig sektaruppskot hava við sær, at revsimál kunnu verða avgjørd við eini sekt, *uttan* at dómstólarnir hava tikið lut í tí ítøkiliga málinum.

Treytirnar fyri at brúka henda avgerðarhátt eru strangar m.a. tí, at fyrisitingarlig sektaruppskot víkja frá, hvussu revsimál vanliga verða viðgjørd. Revsimál verða vanliga kannað av løgregluni. Er grundarlag fyri tí, letur løgreglan ákæruvaldinum málið, sum ger av, um ákæra skal verða reist. Verður ákæra reist, eru tað dómstólarnir, sum taka støðu til, um ákærdi er sekur og áseta revsingina.

Rættargangslógin inniheldur eina umfatandi regulering av mannagongdum í revsimálum, sum m.a. tryggjar rættartrygdina hjá tí einstaka í revsimálum. Ein av meginreglunum er, at tað er dómsvaldið, sum ásetur revsing. Rættargangslógin loyvir tó í ávísum førum ákæruvaldinum at avgreiða mál við fyrisitingarligum sektaruppskotum.

Ein fyrimunur við fyrisitingarligum sektaruppskotum kann vera, at tann myndugleikin, sum arbeiðir við økinum dagliga og hevur serligan kunnleika á økinum, kann avgreiða mál, sum ikki hava við sær hægri revsing enn sekt, rímiliga skjótt og uttan at tyngja rættarskipanina óneyðugt.

Skal einum fyrisitingarligum myndugleika verða heimilað at geva fyrisitingarlig sektaruppskot fyri brot á ásetingar í eini lóg krevst, at hetta er beinleiðis heimilað í lógartekstinum, og at tað er nærri grundgivið fyri hesum í viðmerkingunum til ásetingina.

Heimild at geva fyrisitingarlig sektaruppskot eigur at verða nýtt við varsemi, m.a. tí at hetta brýtur við meginregluna um, at revsimál verða viðgjørd av teimum myndugleikum, sum hava serkunnleika á revsiøkinum, og at tað tí kann setast spurnartekin við rættartrygdina hjá tí einstaka.

Rættarøki, sum í dag heimila fyrisitingarligum sektaruppskotum eru t.d. sjófeingisøkið og skattaøkið. Orsøkin til, at hesi øki eru egnað at nýta fyrisitingarlig sektaruppskot

er, at talan er um økið har tað kunnu verða nógv mál av sama slag, og sum kunnu verða torgreidd. Tí kann tað verða ein fyrimunur, at tað er myndugleikin á økinum, sum hevur neyðugan serkunnleika, sum tekur avgerðina.

## *4.1. Treytir fyri nýtslu av fyrisitingarligum sektaruppskotum*

Fyrisitingarlig sektaruppskot eru revsirættarligar avgerðir, sum skulu lúka treytirnar í revsirættarganginum, og sum av rættartrygdarávum bara kunnu nýtast í heilt serligum førum. Tað er sostatt eitt krav, at málini *eru hóskandi* at avgreiða á henda hátt. Við hetta er at skilja, at talan skal verða um lógarbrot, sum eru av *sama slagi*, eru *einføld* og *uttan próvlig ivamál*. Hetta hevur við sær, at fyrisitingarlig sektaruppskot einans eiga at verða nýtt, um lógarbrotini eru greið og tað ber til uttan víðari at staðfesta tey, og tað skal ikki gerast ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri.

Umframt, at fyrisitingarlig sektaruppskot einans kunnu nýtast í serligum førum, er tað eisini ein treyt, at tann, sum hevur framt brotið, *játtar seg sekan í brotinum og váttar at gjalda sektina.*

Tað er umráðandi at hava fyri eyga, at talan er um revsing, og tí er tað eisini ein treyt fyri at nýta fyrisitingarlig sektaruppskot í einum ítøkiligum máli, at dómsvaldið hevur lagt sektarstøðið fast í mun til tað ítøkiliga lógarbrotið. Tað er sostatt ikki fyrisitingin, sum avger, hvussu hørð revsingin skal vera. Hetta hevur við sær, at tey fyrstu málini um brot á eina áseting, sum kann revsast við fyrisitingarligum sektaruppskoti, skulu leggjast fyri rættin, sum ger av, hvat sektarstøðið fyri brotini er.

Treytirnar fyri nýtslu av fyrisitingarligum sektaruppskotum hava við sær, at hetta slagið av áseting hóskar best á økjum, har sum nógv mál av sama slag eru, og har tað tí kann hava við sær óneyðuga orkuspillu fyri myndugleikarnar at føra málið, umframt at tað kann vera óneyðuga tyngjandi fyri tann einstaka at skula ígjøgnum rættarskipanina.

Mál, sum ikki kunnu avgreiðast við einum fyrisitingarligum sektaruppskoti, t.d. tí viðkomandi ikki kann játta seg sekan ella tí málið ikki er einfalt, verða latin løgregluni og ákæruvaldinum at avgreiða.

Av tí, at talan er um revsirættarligar avgerðir skulu reglurnar í rættargangslógini um innihald í ákæruritum og um, at skuldsetti ikki hevur skyldu til at úttala seg, nýtast samsvarandi í málum, tá fyrisitingarlig sektaruppskot skulu nýtast. Myndugleikar, sum fáa heimild at geva fyrisitingarlig sektaruppskot skulu eisini verða serliga varug við forboðið ímóti sjálvinkriminering, sum eisini fylgir av artikkul 6 í Evropeiska Mannarættindasáttmálanum.

Um fyrisitingarliga sektaruppskotið verður samtykt av tí, sum hevur fingið tað, fellur onnur revsirættarsókn burtur. Hetta hevur við sær, at tann sum tekur við einum sektaruppskoti ikki seinni kann verða ákærdur fyri sama brot, og at sama brot ikki seinni kann verða lagt fyri rættin. Hetta er í tráð við forboðið ímóti dupultari revsing, t.e. *ne bis in idem.*